H71

faldari 8

FTZ KAPPINGIN

H71 - VÍF

Leygardagin 19. mars. kl. 18.00

Hoyvíkshøllin

SUÐUROYAR SPARIKASSI

J&K

BONUS

P/f THOMAS DAM
ITRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03

polytan

Advokatfelagið
Yviri við Strond 4

Auto Service

INNI

AnniJanni

FOKUS 18:29

Lætt og stuttligt

Ger tínar dreymar til veruleika

– sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á – NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

Gjaldskort · Netbanka · Fígging · FramtíðarKonta

Vitja deildina í Vági og Havn.

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

FM-FINALURNAR 2015/16
FRAMMANFYRI STAVN

Í gjár hin 13. mars varð so endaliga vist, at H71 aftur í ár skal vera annað liðið í FM finaluni hjá monnum. Við sigri í útidysti ímóti Stíf við sannførandi tølunum 21 – 27 tryggjaði H71 sær samstundis annað plássið í FM finaluni. Hóast 5 leikumfør eru eftir, so kunnu tvey tey næstu liðini í kappingini ikki bæði fáa H71 aftur – so vit eru í finalunum, sum eittari ella sum tvey-ari. Teir 5 dystir sum eru eftir í grundspælinum, skulu so avgera um H71 skal vera finalulið sum vinnari ella sum næst fremsta lið. H71 hevur frammanundan verið í FM finaluni 4 ferð og higartil hvørja ferð sum næstfremsta lið. Longu av hesi grund, meti eg tað týdningarmikið at vit stríðast hvønn av írestandi dystunum, júst fyri at vinna grundspælið.

Ikki bert gevur fyrsta plássið rætt til at velja um ein ynskir at leika úti ella heima fyrst í finalunum, umframt rættin til heimavøll í møguligum triðja og endaligum finaludysti, men eisini signalerar ein vinnari av grundspælinum, at ein hevur verið stinnastur í sjálvari kappingini. Gaman í, tað er altíð

Framhald á síðu 13

2x3

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Avatara

Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

AVATARA

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.

- Júst sum træ at síggja til
- Strukturin kennist sum træ
- Heitt og mjúkt at ganga á
- Luktfrítt og heilsugóðkent
- Slitsterkt sum laminatgólv

Prísir úr 158,- fyri m²

30 ára garanti

NÓGV YMISK & SERA VØKUR MYNSTUR

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN

VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
Heldfer
SENDISTOVAN
MBM

NordikSOLO 18+

Kom best frá byrjan við NordikSolo

Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.

Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.

SENDISTOVAN

BANKNORDIK

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

fk

Dekk

- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil

- sjálvandi frá Bilrøkt!

Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00

bilrokt.fo

Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

WAAG & Co. PF
Hoyviksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo

www.waagbilar.fo

OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00

Waag & Company er stærsta bilsala í landinum við flest seldum bílum í 2009, 2010, 2011 og 2012. Waag & Company umboðar bilmerkini Citroen, Mercedes-Benz og Mitsubishi og hevur tryggjarnir verksteð til viðlíkahald og umsetingar. Umframt bilsalu og verksteð umboðar Waag & Company Dieselog vatnbógvið.

WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen

Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri

Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

ÁTAKSTILBOÐ:
LUKSUS FAMILJUBILUR ÚR 390.000 KR

NÝGGJUR VOLVO V70 TRIBUTE
EITT SINDUR MEIRI AV TÍ GÓÐA TIL TÍN

Volvo V70 er ein sannur svenskur stationbilur. Stórur, høgligur, tryggur og sannførandi gjøgnumførdur úr enda í annan. Tann nýggi Tribute frá 2016 er veruligt skandinaviskt marglæti í teirru góðu og kendu Volvogóðskuni og við einum longum lista av útgerð. Fíggjarliga kanst tú gera kubbið júst nú bæði í mun til sjálvan bilin og í mun til útgerðspakkan. Bóka ein royndartúr hjá Wenzel

ÚR 390.000 KR

P/F Wenzel | Akranesgøta 5 | FO-100 Tórshavn | tel 35 45 00 | fordpost@wenzel.fo | www.wenzel.fo

WENZEL

NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu

Bílegg eitt kundaprát
og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum

Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo

Framhald av síðu 4

ein fyrimunur sum næstfremstur at koma sum „under dog“ inn í finaluna og at hava alt at vinna og einki at tapa – nakað vit avgjørt hava notið gott av báðar undanfarnu ferð vit hava vunnið finalurnar, ávikavist í 2009 og í 2012. Men soleiðis sum H71 annars hevur leikt meginpartin av árinum í ár, so verður helst trupult at vinna uppá slíka „under dog“ effekt hesaferð. Í finaluni í ár, koma vit inn sum eitt-arar, líkamikið um vit formelt eru endaði á fyrsta ella øðrum plássi. Vit hvørki kunnu ella skulu dúva uppá eina „under dog“ effekt í finaluni í ár.

Annars skilst, at leikliga avrikið hjá fremsta liði á Skála sunnudagin var nøktandi. Vit løgdu betur fyri og komu á odda 5 - 7, tó so, at StíF tók hesa leiðslu inn aftur og legði seg framum. Vit tóku tó StÍf aftur til hálvleiks til hálvleiksstøðuna 12 - 12. StÍF kom betur frá byrjan í øðrum hálvleiki og førdi 14 – 12, men eftir stuttari løtu, hevði H71 lagt seg framum 15 – 19 og varðveitti og økti um leiðsluna fram til leiklok. Endaúrslitið gjørdist sum nevnt 21 – 27, ið avgjørt er ein góður útivallarsigur á Skála. Mangan hevur verið tungt hoyggja at draga á Skála og hevur ein altíð stóra virðing fyri hesum dystum, líkamikið hvat stigatalvan annars sigur. Strandingar spæla nevniliga altíð av fullari megi.

Tað er einki at taka seg aftur í, at avrik okkara í 2016 hava verið ov misjøvn. Eftir

> „Tað er einki at taka seg aftur í, at avrik okkara í 2016 hava verið ov misjøvn

at hava vunnið allar dystirnar í fyrsta og øðrum umfari av landskappingini *(tólv sigrar á rað)*, so hevur ikki verið gott nokk síðani. Seinra semifinalan ímóti KÍF í Hoyvík í steypakappingini var góð og seinri hálvleikur í steypafinaluni ímóti Neistanum var eisini sannførandi. men annars hava vit ikki verið á sama støði sum í byrjanini av kappingini. Eitt er sjálvsagt, at hini liðini nú eru betur fyri enn í byrjanini, men tað er ikki alt. Vit hava ikki sjálvir verið nóg góðir og støðugir í okkara leikligu avrikum. Eitt er í øllum førum vist, at skulu vit vinna FM – finalurnar, so skulu leikligu avrikini og hugburðurin frá byrjanini av kappingini finnast fram aftur, annars verið mótbrekkan brøtt í finalunum.

Ítróttarfelagið Hoyvík H71
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

NEVND
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

Randi Frederiksberg, 212000,
randi.frederiksberg@gmail.com

ÁBYRGD AV FALDARA
Sunneva Jakobsen,
231115, sunneva@liv.fo

ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING,
PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705
Forsíðumynd: Jan Sørensen

ÚTGEVARI
H71

HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

Aldur
18 ár.

Deild?
D18.

Hvørjum plássi spælur tú á?
Eg eri strikuspælari.

Hvør á liðnum hjá tær er størsta drama-queenin?
Tad man nokk vera Niklas Højgaard.

Dugir verst at parkera?
Elberg Elias

Hevur flottastu reyv?
Puha, tad er sikkurt Hanus Krett

Hevur betalt mest til bótakassan?
Steingrímur Hallsson vid eini upphædd á 700kr!

Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?
Eg havi aldrinn skorað nakað flott mál.

Hvørjum kvinnu-leikara, hevði tú roynt eftir?
Har eru so nógvar, at tad er ringt at svara uppá ☺

Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?
Nei eingi serlig.

Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?
Tad er uttan iva tá ið vit vunnu steypafinaluna, eftir longda leiktíð móti Kyndli fyrr í ár.

Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?
Brandur Halgirsson, tá hann hevur verið á A-liðnum, og eg á B-liðnum.

Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?
Besti mátin at skora uppá, er bara at hanga nóg leingi, hyggja eftir málmanninum og so smekka til ☺

Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?
Tad sum ger H71 til eitt so gott og vælvirkandi felag, er tann góði hugburðurin og samanhaldið hjá okkum hoyvíkskingum.

Hvønn skal eg spyrja næst?
Rana Højgaard.

ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

SENDISTOVAN

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Takk fyri at tú stuðlar Javna

Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

VÁST
gráto

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 208090
javni@javni.fo
www.javni.fo

polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
far: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu godkent

Er skeltingin í lagi?

Vilt tú síggja gott út, hava kundar í handilin ella bíleggingar til fyritøkuna, kann skeltingin gerast munurin millum at eydnast og ikki eydnast. Tað skal ikki altíð so nógv til, og tað nýtist ikki at kosta nógv.

Hugsa stórt – hugsa Føroyaprent

Á Føroyaprent hava vit eitt framkomið skeltiverkstað, har vit kunnu framleiða nærum alt, tú kanst hugsa tær.

- Lýsandi stavir á stórar bygningar
- Smá skelti sum t.d. navnaskelti til skrivstovuna
- Stórar plakatir og bannarar til tiltøkini í summar
- Foliuprent til veggir, vindeygu og bilin

Nethandil

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

Føroyaprent

Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo

RÁKIÐ

VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til
HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

www.torshavn.fo

Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

Ung í Eik

1XPETUR

Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

HJARTALIGA TILLUKKU KYNDIL **OG** NEISTIN

Á GRÆKARISMESSU HILDU BÆÐI NEISTIN OG KYNDIL RIMMAR RUNDA FØÐINGARDAGSVEITSLU. SJÁLVANDI VILDU VIT Í H71 FEGIN VERA VIÐ OG FAGNA FELØGUNUM BÁÐUM, SUM HAVA ALSTÓRAN TÝDNING FYRI FØROYSKAN HONDBÓLT. Á NÆSTU SÍÐU ERU KVØÐURNAR BÁÐAR, SUM SUNNEVA JAKOBSEN, FORKVINNA Í H71 BAR FRAM Í NEISTAVEITSLUNI OG RØÐAN BERGTÓRA HØGNADÓTTIR, NEVNDARLIMUR Í H71 BAR FRAM Í KYNDLAVEITSLUNI.

GÓÐU NEISTAFÓLK

SUM FORKVINNA Í H71 VIL EG YNSKJA TYKKUM HJARTALIGA TILLUKKU VIÐ TYKKARA STÓRA DEGI OG TAKKA FYRI INNBJÓÐINGINA.

Eftir: Sunnevu Jakobsen

Havi lisið í grein hjá Vagnuri Mikkelsen, at hondbóltsáhugin her á landi óivað er kveiktur tá KFUM í Keypmannahavn í 1925 vitjaði í Føroyum við einum fótbóltsliði. Sambært Vagnuri, so leiktu hesir fótbóltsdreingir eisini til stuttleika hondbólt í skúlagarðinum á Vaglinum og sum sagt, so hevur hetta óivað kveikt áhugan fyri hondbóltinum. Fimm ár seinri, bleiv fyrsta hondbóltsfelag í landinum stovnað, og má eg siga, at stovnararnir av felagnum hava rakt „plett" tá tey kallaðu felagið fyri Neistin, eitt framúr gott navn til eitt hondbóltsfelag.

Sjálv eri eg ættað úr Dali á Sandoynni og sum flestu tykkara vita, so var eitt hondbóltsfelag í oynni, ið kallaðist Vípan. Vípan klárøði seg sera væl innan kvinnuhondbólt í fjørutunum og tær gjørdust eisini føroyameistarar í 1944 og aftur í 1949. Kom at hugsa um, at í hesum árunum, gingu í Havnagøtum nógvir flottir hermenn og man kann freistast at halda, at Neistakvinnurnar hava fjeppast uppi í hesum hermonnum heldur enn at konsentrera seg um hondbóltin.

Spurdi mammu mína, sum er næstan javngomul við Neistan, hvat hon mintist til hondbólt í Skálavík hagani hon er slektað. Sum hon mintist, so vóru trý lið í oynni, eitt í Skálavík, sum hon so eisini spældi við, eitt úr Húsavík og so Vípan av Sandi, og so legði hon afturat, at tær á Sandi vóru so professionellar, tær reistu runt oyggjarnar at spæla dyst og so høvdu tær okkum eystangentur at venja seg við. Eystangenturnar vóru so tær úr Skálavík og Húsavík.

Tá dystir vóru, fór maður av húsi at hyggja, úr Skálavík fóru gomul sum ung avstað, lastbilarnir í bygdini – ikki mundu teir verða so nógvir í tali – blivu fyltir við fólki og tey, sum ikki passaðu uppí lastirnar, fóru til gongu,

syngjandi ymiskar fosturlandssangir og sjálvandi tær báðar ítróttarkvøðurnar „Førum fram yvir dalar og fjøll“ hjá Janusi Djurhuus og „Á leikvøllum funnust í forum“ hjá Mikkjali á Ryggi.

Nú nógv ár seinri kunnu vit gleðast um, at áhugin fyri hondbóltinum enn er stórur, nógv feløg eru komin afturat og hugaligt at síggja, at hondbóltur nú eisini er kveiktur úti á Argjum har ÍA nú búleikast, og at lív eisini aftur er komið í Vípuna.

Eisini kunnu vit fegnast um, at støðið í hondbóltsspælinum tykist at verða alsamt vaksandi. Tað prógva eisini tey góðu úrslitini landsliðini hava fingið og fáa í kappingunum vit hava luttikið í seinastu tíðina, spennandi verður at fylgja við, hvussu leikur fer.

Neistin hevur lagt lunnar undir føroyskan hondbólt. Tit vóru longu eitt væl skipað og sigursvant felag, tá H71 bleiv stovnað og gjørdu tit tað tí lættari hjá teimum, sum komu aftaná – Takk skulu tit hava fyri tað.

Tit í Neistanum seta barna- og ungdómsarbeiðið høgt og hetta ger, at børnini- og tey ungu trívast í felagnum. At hava ein vælvirkandi felagsskap krevur nógv og drúgt arbeiði og tað er onki at ivast í, at alt tað sjálvbodna arbeiðið, sum verður gjørt runt um í landi okkara, børnunum og teimum ungu at frama, er gull vert fyri samfelagið.

Fyri at taka samanum , so eru tað nú liðin 91 ár síðan at KFUM og fótbólturin komu til Føroyar við hondbóltinum, 85 ár síðani at Neistin byrjaði at leggja lunnar undir ta so framúrskarandi góðu, gleðiligu og gevandi ítróttargreinina, sum hondbólturin er. Feløg leggjast afturat og hondbólturin er í støðugari menning, her kann so passandi leggjast afturat, at U19 kvinnurnar hava í dag spælt seg í finaluna í Challenge Trophy , sum í hesum døgum verður leikt í Georgia.

Fari enn einaferð at ynskja tykkum hjartaliga til lukku við 85 ára stovningardegi Neistans og ynskja tykkum góðan byr framyvir við ynski um gott samstarv.

Takk fyri!

KYNDIL 60 ÁR

HJARTALIGA TILLUKKU VIÐ STÓRA RUNDA DEGNUM – TIT ELLAST VIÐ YNDI . VEGNA H71 VIL EG VIÐ HESUM YNSKJA TYKKUM Í KYNDLI HJARTALIGA TILLUKKU. VIT GLEÐAST VIÐ TYKKUM.

Eftir: Bergtóru Høgnadóttir

Vit hava dystast nógv og tað fara vit vónandi og væntandi at halda áfram við. Tí vit styrkja og eggja hvønnannan í stóran mun.

Hóast vit ivaleys – tá blóðið er heitt – kunnu vera sum reyðgløðandi kýr, so tørvar okkum hvønn annan. Vit gera hvønn annan betur og sterkari.

Og júst soleiðis SKAL tað vera.

Sjálv havi eg sum smágenta spælt við Kyndli – yndislærari mín í allara verðini, Jørleif Kúrberg – rekruteraði meg og nógvar aðrar nonnufressar til felagið. Hugsaði við mær sjálvari í dag eg var í Hoyvíkshøll, og møtti Birgir Sondum við einum U10 gentuliðið at hann eisini man hava rekrutera kyndlaleikarar til Kyndil fleir ættarlið. Fantastiskar eldsálir.

Tá eg spældi við Kyndli minnist eg, at eg helt, at har vóru nógvar kular, fyrimyndarligar ungar kvinnur har, í Kyndli. Minnist Ussu, Tullu og Menu – kipp sum tær vóru raskar og fittar. Og so fittir venjarar eisini, Óluva Dalsgarð,

Sólvá Sørensen og Eddu Poulsen – tær minnist eg allar avbera væl. Eg vildi vera sum tær, tí tær vóru so góðar. Men eg bleiv ongantíð so góð....so tí mátti eg bara fara í H71..... Nei tvætl, so var ikki – men eg havi nógv góð minni, serliga sosialt frá teirri tiðini.

Hondbólturin fyllir nógv í Hoyvík, og fleiri staðni í Føroyum – hugaligt at bæði argjafólk og ikki minst sandoyingar nu aftur eisini eru við aftur í hondbóltinum. Og tað sum feløgini geva børnunum og teim ungu í beinið er stórt: sosialar førleikar, gleði, vinaløg, at handfara mótgongd, toymisarbeiði – ja tað er ikki smávegis.

Dalai Lama sigur at: the purpose of our life is to be happy, eg eri sannførd um, at eisini hondbólturin og sjálvsagt Kyndil gevur nógva gleði í lívinum hjá børnum og ungum í Havn.

Øll hondbólsfeløgini í Føroyum royna ivaleyst sítt besta at geva leikarunum góðar, mennandi upplivingar.....og Kyndil, hevur verið ein sannur klekingardepil....tað prógvar eitt nú ein leikari sum Jóhan á Plógv, sum byrjaði sína karrieru í...Kyndli.

Men at Kyndil er visjonert og eisini megnar at hugsa út um landoddarnar, tað vístu Kyndlafólk longu í 1974, tá tit slóðaðu fyri altjóða limaskapinum hjá Føroyum í hondbólt. Mest aktuella úrslitið av hesum eru U19 gentur okkara, sum luttaka í Georgia í hesum døgum og tær vinna, vinna, og vinna. Og mín sann vunnu tær aftur í dag. Og sjálvandi teljast fleiri kyndlagentur millum hesar. Nevniliga Beinta Bárðardóttir, Hanna Hildibjartsdóttir og Magna Tórðardóttir. Í mun til raskar kyndlagentur, so síggi eg eisini, at fittu genturnar sum borðreiða her í kvøld, eru millum aðrar fleiri av teimum ungu gentunum sum vunnu G17 í steypakappingin í ár. Raskar, raskar gentur.

Og meðan vit í H71 framvegis eru í bestu árum – vit verða 45 ár i vár – so er Kyndl nú er vorðið 60 ár og nærkast pensjónsaldri. Vit vóna at tit fara at koyra á og at tit fara at hava góða heilsu eisni framyvir...júst tí at tit eru væl eldri enn vit, so hava tit lagt lunnar undir, kveikt okkum onnur – Takk fyri tað góðu Kyndlafólk.

Hugburðurin hjá okkum í H71 er, at rúm er fyri okkum øllum og tørvur ER á okkum øllum – og vit vóna og vænta, at vit eisini framyvir fara at geva hvørjum øðrum skarpan gang á vøllinum – og menna ítróttina í felag uttanfyri vøllin. Tað gleða vit okkum til eisini framyvir.

Í Kyndli siga tit, at framtíðin er grøn – og grønt er ein av yndislitum mínum.

Hóast vit eru svørt í H71 so ynskja vit eina framtíð í øllum ælabogans litum. Fjølbroytni ríkar okkum øll.

Hjartaliga tillukku Kyndil – blíðan byr og øll góðynski framyvir.

TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN

ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700

Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

h71 klæðini 2015/16

h71 INTERSPORT Thomas Dam Hróðtur adidas

Vælkomin inn á
gólvið hjá okkum
... her finnur tú
altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315

Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Myklnesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909

SKORA
VIÐ SISU
SISU
Føroya Bjór

FAROE SHIP

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.

Heðin Weihe, verkstaðsleiðari

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.

Í Gullpakkanum fært tú:

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

samskip
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com

SENDISTOVAN

amr.fo

TEY SVØRTU TØLINI

DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í FTZ DEILDINI

Dato	Heimalið	Útilið	Úrslit
23.09.2015	H71	Neistin	27-16
26.09.2015	H71	StÍF	25-22
04.10.2015	VÍF	H71	25-30
11.10.2015	H71	T. Klaksvík	31-23
15.10.2015	Kyndil	H71	22-25
01.11.2015	KÍF	H71	20-25
11.11.2015	StÍF	H71	21-27
15.11.2015	H71	VÍF	28-24
18.11.2015	Neistin	H71	16-26
21.11.2015	T. Klaksvík	H71	24-37
29.11.2015	H71	Kyndil	29-24
13.12.2015	H71	KÍF	24-19
16.12.2015	H71	StÍF	21-22
19.12.2015	Neistin	H71	20-20
06.01.2016	VÍF	H71	19-17
09.01.2016	H71	T. Klaksvík	38-21
17.02.2016	H71	Kyndil	26-26
28.02.2016	KÍF	H71	18-18
06.03.2016	H71	Neistin	30-24
13.03.2016	StÍF	H71	21-27
19.03.2016	H71	VÍF	
23.03.2016	T. Klaksvík	H71	
03.04.2016	Kyndil	H71	
16.04.2016	H71	KÍF	

STØÐAN FTZ DEILDIN

Nr.	Lið	Dystir	V.m	T.m.	Munur	Stig
1	H71	20	531	427	104	33
2	VÍF	20	564	512	52	28
3	KÍF	19	443	418	25	22
4	Kyndil	19	502	456	46	21
5	StÍF	20	527	532	-5	18
6	Neistin	19	464	483	-19	14
7	T. Klaksvík	19	440	643	-203	0

Dagført: 16.03.16

LIÐINI HESUFERÐ

H71

Málmenn:

1 Ári E. Dam
12 Tóraldur Kollsker
16 Johan Hofgaard

Útileikarar:

2 Djóni Vest Højgaard
3 Mark Lausen Marcher
4 Rúni Vest Højgaard
8 Pætur Thomsen
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
22 Helgi Hoydal
23 Hilmar Leon Jacobsen
45 Peter Krogh
89 Jónas Djurhuus
99 Tróndur Arge

Venjarar:
Petur Mittún
Halgir Dahl Olesen

Málmansvenjari:
Jens á Skipagøtu

Liðleiðarar:
Petur Sivertsen
Rene Dahl Olesen
Andras Marr Poulsen

VÍF

Málmenn:

12 Niclas Simonsen
16 Høgni Johansen

Útileikarar:

2 Sámal Joensen
4 Sjúrður Olsen
5 Jóhan í Garðastovu
6 Rúni Joesnen
7 Hanus Christophersen
8 Julian Olsen
9 Áki Egilsnes
10 Andrias Eriksen
11 Jón Muller
15 Nuunu L. Olsen
18 Agnar Joensen
20 Heini Hanusarson
21 Filip Jojic
33 Niclas Selvig

Bonkur:
Ingi Olsen
Jákup Durhuus
Jóngerð Nielsen
Dejan Lacok

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT